P/F Beta:

## Byggir helst nýggju skipini í Spaniu

FISKIVINNA

*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Mangt er, sum bendir á, at reiðaríið, P/F Beta í Saltangará, fer at byggja teir nýggju trolararnar, sum felagið skal hava, í Spaniu, har teir eisini bygdu Bak og Stelk. Tað var skipasmiðjan, M. Cies í Vigo, sum bygdi skipini, ið reiðaríið hevur verið væl nøgt við.

- Vit høvdu góðar royndir av at samstarva við spaniólar, og vit vóru nøgdir við prísin. Tí bendir nógv á, at tað verður hendan skipasmiðjan, sum fær sáttmálarnar um nýggju trolararnar.

Ragnar S. Olsen, reiðari, vísir á, at teir eisini hava kannað møguleikarnar at byggja skipini í eitt nú Danmark og Kina, men hann væntar, at teir aftur hesaferð enda í Spaniu.

Umhugsað hevur sjálvsagt eisini verið at byggja í Føroyum, men einki er, sum bendir á, at so verður.

- Vit noyðast at hyggja at tí fíggjarliga partinum og at byggja har, sum vit fáa tað besta tilboðið, sigur reiðarin.

Stjórin á Tórshavnar Skipasmiðju, Gunnar Mohr, sigur í samrøðu við Vinnuvitan, at skipasmiðjan hevur ongan møguleika at levera skipini til P/F Beta innan eitt ár.

- Tað er ikki hugsingur um at fáa fatur á skrokkunum so skjótt, at vit kunnu lata skipini til ta tíð, sum reiðaríið ynskir.

Hann sigur, at allar skipasmiðjur um okkara leiðir, sum byggja skipsskrokkar, hava so nógv at gera, at skipasmiðjan sleppur ikki fram at fyrr enn einaferð komandi summar.

- At byggja skrokkarnar sjálvir, ber als ikki til, tí her eru vit ikki kappingarførir í prísi, sigur Gunnar Mohr í samrøðu við Vinnuvitan.

Ragnar S. Olsen sigur, at hóast tað hevur gingið striltið, nú upsaprísirnir hava verið lágir og oljuprísirnir eru høgir, ætlar reiðaríið ikki at gevast á hondum.

- Vit ynskja at halda fram, og tí velja vit at byggja nýtt, sigur reiðarin.

# Hon veit hvar »skápið-

**Hon er innanduraarkitektur, men ætlar sær ikki at seta seg niður sum ein onnur skrivstovumús at tosa við fólk. Hennara fartelefon verður í fyrsta lagi hennara arbeiðsamboð, og tá ið fólk, handlar, matstovur, virkir ella stovnar ringja um ráðgeving og vegleiðing, fer hon á gátt at hyggja upp á umstøðurnar og saman við viðskiftafólkunum at finna út av, hvør teirra tørvur er**

RÁÐGEVING

*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

"Rákið innan innrætting er í løtuni, at alt ber til. Litsamansetingar og samansetingar millum nýtt og gamalt. Eingin generell regla er fyri hesum. Tó eru nakrar óskrivaðar reglur, sum tú skalt fylgja, so alt ikki endar í einum hurlivasa. Tað krevst ein hárfín balansa at fáa tað at eydnast. Fert tú yvir um strikuna, oyðileggur tú alt..."

Soleiðis skrivaði ein kvinna úr Vestmanna í eini grein í februar – eini grein, sum snúði seg um heilt onnur viðurskifti.

Men hon kundi ikki lata vera, sjálvt um greinin í fyrsta lagi snúði seg um støðuna á Listasavni Føroya.

Og hon helt fram:

"Innrættingin hevur størri týdning fyri trivnaðin, enn fólk flest geva sær far um. Á arbeiðsplássum økist vælveran hjá teimum, sum har eru – og í handlum mennist keypihugurin hjá viðskiftafólki munandi. Ofta er tað ikki so nógv, sum skal til, men tað er broytingin, sum ger munin. Tey trý F'ini - Form, Farve og Funtion – skulu ganga upp í eina hægri eind, og tá verður úrslitið væleydnað..."

Kvinnan, vit tosa um og fara at tosa við í hesi greinini, er Gunnbjørg Gunnbjørgsdóttir, ið varð liðug við útbúgvingina sum innanduraarkitektur í 1990.

Samstundis, sum hon hevur verið í øðrum størvum øll árini, síðan hon tók útbúgvingina, hevur hon í síni frítíð tikið sær av ymiskum ráðgevingaruppgávum fyri eitt nú stovnar, fyritøkur, virkir, matstovur, handlar og privatfólk.

Nú hevur hon so stovnað firmaið, Interior og fer burtur av at leggja seg eftir at veita ráðgeving og tænastu við tilknýti til sína útbúgving sum innanduraarkitektur.

### Eingin skrivstovumús

Sjálv sigur Gunnbjørg, at hon bjóðar seg fram at veita ráðgeving innan innrætting, geva íblástur til persónligan stíl, vegleiðing um rætta tilfarið og at koma við hugskotum til tað perfekta rúmið, sum hon tekur til.

Hon ætlar sær ikki at seta seg niður á eini skrivstovu at tosa við fólk. Hennara fartelefon verður í fyrsta lagi hennara arbeiðsamboð, og tá ið viðskiftafólk ringja, fer hon á gátt at hyggja upp á umstøðurnar og saman við viðskiftafólkunum at finna út av, hvør teirra tørvur er.

- Semjast vit um, at eg skal koma við vegleiðing og góðum ráðum, eri eg til reiðar at geva tilboð upp á bæði smátt og stórt, sigur Gunnbjørg, sum er spent eftir avbjóðingini, nú stundir verða at átaka sær uppgávur sum innanduraarkitektur burtur av.

Hon er eisini til reiðar at arbeiða út um alt landið.

- Sjálvandi fari eg ikki til Suðuroyar til eina einstaka lítla uppgávu, men so skjótt grundarlag er fyri tí, eri eg til reiðar at ferðast kring landið. Tað er bara at ringja og spyrja seg fyri, tí einki er avgjørt upp á forhond. Kanska hevur onkur annar longu ringt, so eg knappliga ein dag fari um Suðuroyarfjørð at hjálpa fólki við góðum hugskotum. Tað er ikki neyðugt, at vanlig smáttaríir hjá privatfólki nýtast at kosta tað heilt stóra, sigur hon.





*- Semjast vit um, at eg skal koma við vegleiðing og góðum ráðum, eri eg til reiðar at geva tilboð upp á bæði smátt og stórt, sigur Gunnbjørg Gunnbjørgsdóttir, sum er spent eftir avbjóðingini, nú betri stundir verða at átaka sær uppgávur sum innanduraarkitektur. Her er hon avmyndað á Føroya Lívstrygging, har hon hevur givið móttøkuni eitt nýtt andlit*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*